LM-073/2025

Fylgiskjal 8.

Guðrun Maria Mortensen

Fra: Rani Reginsson Johansen
Sendt: mánadagur, 20. oktober 2025 12:50
Til: Guðrun Maria Mortensen
Cc: Jan Simonsen; Birita Ludvíksdóttir; Birta Biskopstø; Rúna Fossdal Guttesen; Nicholas Nielsen
Emne: SV: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Hey Guðrun,

Her eru viðmerkingarnar frá TAKS:

1) Gjaldsskyldan
Í dag er gjaldsskyldan fyri heilsutrygdargjald tengd at bústaði, eins og rætturin til veitingar eisini er tengdur at bústaði.

TAKS mælir til at broyta grundarlagið fyri gjaldsskyldu frá bústaði til skattskyldu, eins og fyri onnur sosial gjøld, sum TAKS krevur inn – herundir barsilsgjald, arbeiðsmarknaðareftirløn og kringvarpsgjald.

Orsøkin er, at tað er lættari at umsita og menna skipanir, tá grundarlagið fyri gjaldsskyldu er tað sama fyri øll gjøld. Harumframt hevur TAKS til tíðir trupulleikar við, at bústaður hjá fólki í landsfólkayvirlitinum verður broyttur afturvirkandi, tí so skal heilsutrygdargjaldið samsvarandi rættast.

Verður grundarlagið broytt frá bústaði til skattskyldu, skal eisini takast støða til, um einans persónar við fullari skattskyldu skulu rinda (eins og við kringvarpsgjaldinum), ella um eisini persónar við avmarkaði skattskyldu skulu rinda (eins og við arbeiðsmarknaðareftirlønini). Umsitingarliga er tað einfaldari fyri TAKS, um gjaldsskyldan verður treytað av fullari skattskyldu.

Undantak kann gerast fyri persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar, men hava varðveitt fulla skattskyldu, eins og í § 7, stk. 1, í løgtingslóg um kringvarp.

2) Freistir
Í dag ásetur løgtingslógin um heilsutrygd onga freist fyri, nær broytingar kunnu gerast í heilsutrygdargjaldi – eitt nú tá skattskylduga inntøkan verður broytt. Freistir eru kortini til, nær TAKS kann broyta skattskyldugu inntøkuna hjá borgarum, og nær skattaborgarar sjálvir kunnu biðja um at fáa skattskyldugu inntøkuna broytta.

TAKS mælir tískil til, at somu freistir sum fyri at broyta skattskyldugu inntøkuna, eisini verða galdandi at broyta heilsutrygdargjald.

Broytingin kann gerast sum eitt nýtt stykki undir § 24 og t.d. orðast soleiðis:

> *"§ stk. 6. Ásetingarnar í §§ 8 og 9 í løgtingslógini um fyrisiting av skatti eru samsvarandi galdandi fyri at áseta, broyta ella taka upp aftur gjald til heilsutrygd."*

Sambært høvuðsregluni í § 8 í skattafyrisitingarlógini kann broyting ikki fremjast longur aftur enn 3 ár. Eru serligar orsøkir, sum nevndar í § 9 í skattafyrisitingarlógini, kunnu broytingar tó gerast longur aftur enn 3 ár.

3) Undantøk (málsviðgerð)
Í dag skulu persónar søkja Heilsutrygd um undantak. Við hesum lógaruppskoti er ætlanin at flyta málsviðgerðina til TAKS.

TAKS mælir tískil til at broyta orðingina í § 24, stk. 2, 1. pkt., so tað beinleiðis framgongur, at umsóknin skal sendast til TAKS: *"... kunnu, eftir umsókn til TAKS, verða undantiknir gjaldskyldu..."*

Í framhaldi av hesum eigur heimildin at kunna útvega sær upplýsingar frá øðrum myndugleikum til nýtslu í sambandi við umsóknir um gjaldsundantøku eftir § 24, stk. 2, at verða flutt frá Heilsutrygd til TAKS:

Verandi orðing:
"... kann Heilsutrygd útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS."

Nýggj orðing:
"... kann TAKS útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum."

4) Undantøk (tíðarskeið)
Í dag verður undantak frá gjaldsskyldu fyri prosentgjaldið við støði í Norðurlendska konventión um sosiala trygd veitt fyri partar av árum, sambært § 3, stk. 1, nr. 2, í kunngerð um undantøku fyri gjaldsskyldu av heilsutrygdargjaldi.

TAKS mælir til, at undantøka verður veitt fyri heil ár. Hartil, at viðkomandi persónar fáa undantak bæði fyri árið, tá arbeiðið byrjar uttanlands, og fyri árið, tá arbeiðið steðgar.

Orsøkin er, at TAKS ikki hevur skipanir, ið avgreiða hetta sjálvvirkandi, og at TAKS ikki kann síggja, nær ein B-inntøka er forvunnin, og hvat tíðarskeið, hon hoyrir til, uttan nærri málsviðgerð. Tað er lutfalsliga kostnaðarmikið at gera skipanir til at umsita undantøk fyri partar av inntøkuni, ið fevna um fáar dagar og lítlar upphæddir (fyri 2024 søktu einans 19/174 persónar um undantak fyri partar av inntøkuni), og tað krevur ósamsvarandi málsviðgerð at gera tað rætt.

Vinarliga

Rani R. Johansen
fulltrúi

Lógardeildin
Tel. 352741

TAKS

Postrúm 2151, FO-110 Tórshavn
www.taks.fo, taks@taks.fo, tel 35 26 00

Fyrivarni
Ert tú ikki rætti móttakari av hesum teldubrævi, vinarliga sig mær frá og strika brævið.

Fra: Guðrun Maria Mortensen <Gudrunmm@hmr.fo>
Sendt: fríggjadagur, 26. september 2025 10:54
Til: Heilsutrygd <heilsutrygd@heilsutrygd.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; limapostur@antares.fo; pam@pam.fo; malan@navigare.fo
Cc: Jan Simonsen <jan.simonsen@hmr.fo>; Birita Ludvíksdóttir <birita.ludviksdottir@hmr.fo>
Emne: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd

Góðan dag

Viðhefta lógaruppskot verður hervið sent tykkum til hoyringar. Hoyringsfreistin er fríggjadagin 24. oktober 2025.

Endamálið við lógaruppskotinum er at flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldinum til TAKS at umsita. Við hesi broyting fara vald og gjald at fylgjast, umframt at

LM-073/2025

tað verður greiðari fyri borgaran, sum frameftir hevur ein almennan stovn at venda sær til, heldur enn tveir ymiskar, sum tað er við verandi skipan.

Um tit hava spurningar ella ivamál til lógaruppskotið, eru tit vælkomin at venda tykkum til undirritaðu.

Vinaliga/Sincerely

Guðrun Maria Mortensen
Fulltrúi / Adviser

Heilsumálaráðið/
Ministry of Health
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304050 • Mobile +298 734026
gudrunmm@hmr.fo • www.hmr.fo